# Eru sinnað at tryggja listaverkini hjá bankanum

**Jógvan á Lakjuni fer fyrsta dagin at koma við einum uppskoti um, hvussu listaverkini hjá Føroya Banka verða bjargað undan einskiljingini**

EINSKILJING OG LIST
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er eitt gott hugskot at tryggja, at listaverkini í Føroya Banka ikki enda aftur á privatum hondum.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í Mentamálum hevur tikið áheitanina frá Listasavni Føroya til eftirtektar og sum vit hava umrøtt í aðrari grein her í blaðnum.

Eisini landsstýrismaðurin heldur, at tað er umráðandi at tryggja, at listaverkini hjá bankanum ikki fara av landinum.

Hann sigur, at Mentamálaráðið arbeiðir í løtuni fyri at finna útav hvussu farast kann fram fyri at trygga at listaverkini hjá Føroya Banka verða varðveitt á føroyskum hondum.

– Ein máti kundi verið at stovna ein grunn sum fekk listaverkini.

Men hann heldur, at tað er eitt frálíkt uppskot Listasavnið fær listaverkini.

Jógvan á Lakjuni sigur, at Mentamálaráðið fer fyrsta dagin at koma við einum uppskoti um, hvussu vit kunnu tryggja, at listaverkini ikki gleppa okkum av hondum, tí í løtuni eru tey almenn ogn.

– Her eru sannar perlur og tí eiga vit at tryggja, at listaverkini ikki gleppa okkum av hondum, sigur landsstýrismaðurin.

Hann væntar, at niðurstøðan hjá Mentamálaráðnum verður, at Listasavnið fær ognarrættin til listaverkini hjá bankanum.

– Men Listasavnið hevur ikki pláss fyri teimum og tí kunnu vit væl hugsað okkum eina loysn, har tey verða hangandi í bankanum, leggur hann afturat.

Eyðun á Rógvi er formaður í Fíggingargrunninum, sum eigur bankan. Hann sigur, at nevndin í grunninum hevur ikki viðgjørt málið enn og tí dugir hann ikki at siga, hvørja støðu, Fíggingargrunnurin fer at hava til áheitanin frá Listasavninum.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá sjálvari bankaleiðsluni, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Førleikatarnað fáa betri sømdir

**Nú koma lógarbroyting og nýggjar kunngerðir um stuðul til at keypa bil sambært forsorgarlógini og til bústaðarbroytingar**

FØRLEIKATARNAÐ

Nú eru neyðugu broytingarnar í forsorgarlógini gjørdar, so at greið heimild er fingin til vega fyri at kunna veita førleikatarnaðum stuðul til at keypa avlamisbil og til bústaðarbroytingar. Samstundis hevur lógarbroytingin givið høvið til at fáa nakrar betringar inn í lógina, samanborið við galdandi siðvenju.

– Av týðandi broytingum kann nevnast, at í mun til verandi siðvenju um stuðul til at keypa avlamisbil, verður lán framyvir játtað til allan keypsprísin, men tó soleiðis at reglur verða ásettar í nýggjari kunngerð um inntøkumark í sambandi við afturrindan av láninum, sigur Almanna- og heilsumálaráðið í tíðindaskrivi.

Viðvíkjandi bústaðarbroytingum er í mun til verandi siðvenju nú møguligt hjá Almannastovuni at bera útreiðslurnar av at útvega persóni ein annan bústað. Treytirnar fyri tí er, at tað verður mett neyðugt orsakað av, at stuðul til innrættan av verandi bústaði ikki er nøktandi. Í hesum sambandi eru tó reglur ásettar í kunngerð, um í hvønn mun stuðul til útvegan av nýggjum bústaði og bústaðarbroytingar sum heild skulu afturrindast. Reglur um afturrindan eru einans galdandi, tá talan er um munandi virðisøking fyri viðkomandi persón.

Ein fylgja av nevndu lógarbroytingum er tvær nýggjar kunngerðir um stuðul til at keypa bil sambært forsorgarlógini og um afturgjaldsskyldu í sambandi við bústaðarbroytingar.

# Regin Joensen nýggjur í nevndini hjá Eysturoyar Javnaðarfelag

Aðalfundur var í Eysturoyar Javnaðarfelag seinasta mánakvøld. Helena Eliasen, sum hevur sitið í nevndini seinastu 14 árini, nøkur ár sum næstformaður, tók ikki við afturvali. Í hennara stað kom Regin Joensen sum nýggjur nevndarlimur í Eysturoyar Javnaðarfelag.

Nevndin sær nú soleiðis út:
Eyðun Johannesen, form
Eliseus Ó. Johannesen, n. form
Sunleiv Højgaard, skrivari
Regin Strømsten
Eileen Jørgensen
Arthur Johansen
Michael Pattingson
Inga í Jógvansstovu
Regin Joensen
Jancy Olsen, eyka
Jóannes Højsted, eyka

Eftir aðalfundin var fundur undir heitinum "Flokkurin møtir veljarunum". Hetta var fyrsti fundur í fundarøðini hjá Javnaðarflokkinum, har ting- og landsstýrisfólk floksins vitja limafeløgini og møta veljarunum. Á fundunum fáa umboð floksins høvi at greiða frá, hvørji úrslit eru rokkin í valskeiðinum, sum nú fer at halda, og har veljarin fær høvi at siga sína hugsan um politikkin og úrslitini. Skráin fyri fundirnar sær soleiðis út:

- Hesum føru vit á val við
- Hetta er komi burturúr
- Hvat heldur veljarin

- Fleiri enn 40 fólk høvdu leitað sær á fundin, sum var hildin í arbeiðsmannafelagshúsinum í Leirvík. Fundurfólkið var í høvuðsheitum samt um, at Javnaðarflokkurin hevur fingið nógv javnaðarmál ígjøgnum tingið hetta samgonguskeiðið. Tey hildu, at Javnaðarflokkurin hevur eina góða sak, og at flokkurin hevur fingið nógv av skafti. Samanumtikið ein sera góður fundur, sigur Javnaðarflokkurin í tíðindaskrivi.

i Sosialurin

